# AGA- & ETISKANEVNDIN

**KÆRA 5/2023**

| *FSF-skrivstovan upplýsir Aganevndini:* | |
|---|---|
| **Málsheitið: ÍF kærir NSÍ fyri brúk av ov ungum leikara í 1. deild kvinnur** | |
| Deild: 1. deild kvinnur | Hvør hevur reist málið: ÍF |
| Kapping: Landskapping | Nevndin móttikið kæru: 12. juni |
| Møguligt brot framt: 4. juni við Løkin | Kærugjald goldið: Ja |
| Partshoyring: Ja | 5 daga kærufreist hildin: Ja |
| Áheitan um munnliga viðgerð: Nei | Starvsnevndarummæli: |

**Úrskurður**

Aga- og etiskanevndin staðfestir, at ungi leikarin var ólógligur leikari í vaksnamannadeild og tí verður NSÍ dømt at tapa dystin 0-3 samsvarandi grein 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

Fyri tilvitað svik við einum navni á dómaraseðilinum, verður NSÍ dømt at rinda bót á kr. 2.000. Bótin er ásett við heimild í grein 6, bókstav c í Aga- og etisku reglugerðini.

**Kæran, partshoyringin og møguligt Starvsnevndarummæli**

ÍF kærir NSÍ fyri brúk av ov ungum leikara í 1. deild kvinnur, leiktur 4. juni við Løkin. NSÍ vann dystin 2:1. ÍF førir fram, at NSÍ hevur brúkt ein 14 ára gamlan leikara, sum á dómaraseðlinum helst spældi undir navninum á øðrum leikara. ÍF hevur sent myndir við kæruni, sum týðiliga eyðmerkja umrødda leikara í nevnda dysti.

NSÍ hevur ongar viðmerkingar til kæruna.

**Heimildir hjá Aganevndini at viðgera málið**

Vísandi til grein 2, 3 og 5 í aga- og etisku reglugerðini hjá FSF, hevur Aganevndin málsføri at viðgera hetta mál.

**Fakta í málinum**

Aga- og etiskanevndin staðfestir, at prógvfast er, at ungi leikarin leikti við NSÍ í nevnda dysti og at viðkomandi leikari leikti undir navninum hjá øðrum leikara.

ÍF hevur lagt myndir við sum stuðul fyri kæruni og NSÍ hevur ikki afturvíst fakta í málinum.

**Lógarverkið**

Sambært grein 4 í Kappingarreglunum fyri fótbólt, skal leikari verða fyltur 15 ár fyri at leika í vaksnamannadeild hjá kvinnum. Sambært grein 28 í Kappingarreglunum fyri fótbólt, skal dómaraseðilin innihalda yvirlit yvir nøvn á leikarum, venjarum og øðrum ábyrgdarfólkum, sum hava samband við dystin.

**Staðfestingar, metingar og niðurstøða**

Aga- og etiskanevndin staðfestir, at NSÍ hevur gjørt brúk av leikara, sum ikki hevði aldur at leika við vaksnamannadeild. Talan er um brot á grein 4 í Kappingarreglunum fyri fótbólt. Eisini hevur NSÍ roynt at fjala yvir brotið við at skráseta leikaran á dómaraseðilin undir navninum hjá øðrum leikara.

# AGA- & ETISKANEVNDIN

Aga- og etiskanevndin staðfestir, at ungi leikarin var ólógligur leikari í vaksnamannadeild. Fordømi eru um, at brúk av ólógligum leikara verður revsað við, at liðið verður dømt at tapa dystin. Niðurstøðan er, at NSÍ verður dømt at tapa dystin móti ÍF 0-3 samsvarandi grein 41 í Kappingarreglunum fyri fótbólt.

Fordømi eru um, at svik við upplýsingum á dómaraseðilinum verður revsað við bót. NSÍ verður dømt at rinda bót til FSF á kr. 2.000 fyri tilvitað svik við einum navni á dómaraseðilinum. Bótin er ásett við heimild í grein 6, bókstav c í Aga- og etisku reglugerðini.

**Kæruvegleiðing**

Avgerðin um at NSÍ tapir dystin 0-3 kann, innan 5 dagar, kærast til Yvirkærunevndina samsvarandi grein 10, bókstav f. Avgerðin um bót kann ikki kærast.

**Staður, dagfesting og undirskrift:**

**Tórshavn 26. juni 2023**

Anni á Hædd

Anni á Hædd
forkvinna

Í Aga- og etiskunevndini eru: Anni á Hædd, forkvinna og løgfrøðingur, Ken Nónklett, varaformaður og løgfrøðingur, Eli Thorsteinsson, løgfrøðingur, Jóhan T. Davidsen, løgfrøðingur og Sissal Kj. Kristiansen, sniðgevi og ráðgevi.